Álit

í

løgtingsmáli nr. 102/2020: Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi Lov sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. apríl 2021.

Lógaruppskotið hevur til endamáls at seta úr gildi gamla lóggávu, sum hevur tænt fyri seg og er óneyðug í dag.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 19. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	